


**formula**deildin

*Menning og búnan av einum nýggjum ættarliði, sum í framtíðini skal bera B36 langt. Tað er setningurin, sum Heðin Askham hevur sett sær, nú hann fyri fyrstu ferð roynir seg sum venjara í fremstu føroysku røð*

# Byrja av nýggjum

## Nýggi B36-venjarin er als ikki nervaður av stóru útskiftingini, sum hevur verið á liðnum. Heldur velur hann at seta fokus frameftir, soleiðis at eitt nýtt og sterkt B36-lið kann byggjast upp

Í fleiri ár hevur Heðin Askham talst millum teir heilt væl útbúnu føroysku venjararnar. Men tað er ikki sum venjari í fremstu føroysku deildunum, at hann hevur gjørt vart við seg.

Heldur hevur tað verið sum venjari hjá fleiri av føroysku U-landsliðnum, har fleiri heilt góð úrslit eru rokkin. Og sjálvur sigur hann seg ikki hava strembað eftir meira sum so.

- Tað hevur ikki verið soleiðis, at eg støðugt havi bíðað eftir einum møguleika at venja eitt Formula-lið. Heldur havi eg tað so, at eg taki ein dag í senn, og so havi eg tikið støðu til nýggjar avbjóðingar, tá hesar hava hava víst seg, sigur Heðin Askham.

- Í vetur stóð mær so í boði at gerast venjari hjá einum Formulaliði, men eg takkaði tó nei. Tað fekk meg tó at hugsa nakað um ein slíkan møguleika, og tá B36 so spurdi seg fyri, tók eg av.

Og tað at tú sum fyrrverandi HB-spælari nú tekur við í B36, er kanska ikki nakað, ið tú hugsar so nógv um sum venjari?

- Nei. Um nakað, so er tað bara við til at gera avbjóðingina meira spennandi, heldur Heðin, sum í fleiri ár var ein stinnur verjuskansi hjá HB.

**Nýtt lið**

Seinastu árini hevur B36 støðugt leitað móti toppinum. Umframt meistaraheitið í 2006 hevur felagið tvær ferðir spælt seg víðari í europeiskum høpi, vunnið kappingina um Løgmanssteypið og annars havt bæði silvur- og bronsukrónur um hálsin.

Stór frágongd hevur tó merkt hópin í ár, og tí rokna tey fægstu við, at felagið ger seg eins nógv galdandi í ár. Men hetta tykist als ikki nervað nýggja venjaran hjá felagnum.

- Tekur tú hópin mann fyri mann, so hava vit mist nærum eitt hálvt landslið. Nakrir eru sjálvandi komnir ístaðin, men hópurin er samstundis væl yngri.

- Men talan er samstundis um heilt øðrvísi spælarar, og tí verður tað eitt heilt øðrvísi B36-lið, sum fólk fáa at síggja í ár. Við spælarunum, sum eg havi at arbeiða við, ber als ikki til at leggja seg eftir sama spælistílinum, sigur venjarin.

Meinar tú við hesum, at B36 í nógv størri mun verður liðið, sum stýrir spælinum, heldur enn at standa tætt í verjuni og dúva upp á kvikar áleyparar?

- Um tað gongst eftir ætlan, so ja. Hópurin telur fleiri góðar fótbóltsspælarar, og tað er ætlanin, at hesir skulu verða spælstýrandi.

**Stór sveiggj**

Nógv av tosinum kring B36 hevur í vetur snúð seg um, at liðið ikki fer at gera seg galdandi frammi í oddinum í ár.

Heðin Askham fæst ikki at siga, at so verður, men hinvegin vil hann ikki seta nakra plasering í oddinum sum krav fyri avrikið komandi mánaðirnar.

- Eg havi alla tíðina sagt, at liðið er rættiliga ungt. Og tí koma vit helst at síggja nøkur stór sveiggj í avrikunum. Tað kann væl henda seg, at vit fara at vinna onkran dyst móti bestu liðunum. Men hinvegin kann eisini vera, at vit tapa móti onkrum botnliði.

- Men fáa vit neyðuga friðin at arbeiða. So ivist eg ikki í, at vit í ár kunnu leggja grundarlagið undir eini sera góðari framtíð fyri felagið. Og tað er hetta, sum vigar mest hjá mær her og nú, sigur Heðin Askham.

Og so kundu vit lagt afturat, at júst tað at arbeiða við ungum spælarum er nakað, sum Heðin er vanur við. Og enn er hann knýttur at arbeiðinum við yngru landsliðunum hjá føroyskum fótbólti. Í heyst standa soleiðis tvær uppgávur á skránni hjá U21-landsliðnum, sum Heðin saman við Bill McLoud Jacobsen hevur ábyrgdina av.

---

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

## Metingin

**Við missinum av Mikkelsen, Benjaminsen, Thomassen og Sylla er mest sum allur miðaksin hjá B36 burtur í einum. Tí kann neyvan roknast við, at liðið aftur í ár blandar seg í oddinum. Við fleiri ungum spælarum er eisini væntandi, at avrikini fara at sveiggja nógv, men kvaliteturin í einstøku spælarunum eigur tó at borga fyri, at liðið ikki kemur í veruligan niðurflytingarvanda.**

Microsoft GOLD CERTIFIED Partner
formula.fo